# Býarbókasavnið

## Ársfrágreiðing 2016



# Ársfrágreiðing 2016

**Umfatar:** Býarbókasavnið í Havn
Kollafjarðar bygdar- og skúlabókasavn
9 skúlabókasøvn í Tórshavnar kommunu

## Býarbókasavnið

Á Býarbókasavninum eru 3 deildir:

Útlán (vaksin og ung)
Barnabókasavn
Lesistova og blaðkafé

## Missión og visjón

Í Mál- og avriksavtalu fyri 2015-16, sum varð gjørd millum Býarbókasavnið og Mentamáladeildina/Trivnaðarfyrisitingina í Tórshavnar kommunu í 2015, eru missiónin (høvuðsuppgávan) og visjónin (framtíðarmyndin) orðaðar soljóðandi:

### Missión (høvuðsuppgáva)

Býarbókasavnið fremur upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi í Tórshavnar kommunu og í Føroyum annars.

### Visjón (framtíðarmynd)

Býarbókasavnið skal tryggja øllum borgarum í kommununi og borgarum aðrastaðni frá góða og sjónliga atgongd til upplýsing, lærdóm og mentanartilboð, sum gevur hvørjum borgara sær, uttan mun til aldur, kyn ella samfelagsliga støðu

annars, møguleika fyri fordjúpilsi og menning av egnum evnum og førleikum.

Til at røkka endamálinum skal Býarbókasavnið hava til taks bøkur, tíðarrit, ljóðbøkur og annað hóskandi tilfar, sum verður lænt út uttan viðurgjald, og sum umboðar dygd, fjølbroytni og er aktuelt. Eisini skal Býarbókasavnið bjóða umstøður, umhvørvi og kunning, sum vekir forvitni og áhuga fyri luttøku í samfelagi og mentanarlívi.

Sum arbeiðspláss skal Býarbókasavnið vera eitt stað, har starvsfólkini sleppa at royna seg yrkisliga og persónliga, og har tey verða vird og sædd bæði sum menniskju og sum fakfólk.

## Bókasavnsbrúkarar

Í 2016 vóru 143.860 skrásettar vitjanir á Býarbókasavninum. Hetta eru 5.360 fleiri vitjanir enn í 2015, tá talið var 138.500. Tað er ein hækking á 4%.

Skrásettir lánarar vóru 10.492 í tali við árslok 2016. Tað eru 575 færri enn við árslok 2015, tá talið var 11.067.

## Útlán

Samlaða útlánið lækkaði í 2016 úr 79.116 niður í 71.630, tað er 7.486 ella 9%. 5% av útláninum var í 2016 e-tilfar móti 4% í 2015. E-tilfar eru e-bøkur, ljóðbøkur og filmar á netinum.

## Útlán og vitjandi 2010-16




Mest læntu skaldsøgurnar til vaksin á føroyskum vóru:

William Smith: *Hinumegin garðin*

Høgni Debes Joensen: *Stjørnustundir í skugga*

Jóanes Nielsen: *Bommhjarta*

Jógvan Isaksen: *Tann fimti maðurin*

Steintór Rasmussen: *Deyðin fer í bindiklubb*

Mest læntu skaldsøgurnar til vaksin á øðrum málum vóru:

Jojo Moyes: *Efter dig*

Jussi Adler-Olsen: *Den grænseløse*

Sara Blædel: *Kvinden de meldte savnet*

Kristin Marja Baldursdóttir: *Køligt daggry*

Steffen Jacobsen: *Trofæ*

Harlan Coben: *Seks år*

Mest læntu yrkisbókmentirnar vóru:
Sven Brinkmann: *Stå fast*
Kitty Maj Ellefsen. *Frá reyðvíni til marathon*
Anders Damsgård: *Hvor solen græder*
Rosemary Sullivan: *Stalins datter*
Giulia Enders: *Tarme med charme*
Sjúrður Skaale: *2000*
*Faroese : a language course for beginners*

Mest læntu yrkingasøvnini á føroyskum vóru:
Jóanes Nielsen: *Yrkingar 2014*
Tóroddur Poulsen: *Glopramjólk*
Sissal Kampmann: *Ravnar á ljóðleysum flogi*
Jóanes Nielsen: *Tapet millum øldir*
Jóanes Nielsen: *Pentur*

Mest læntu ungdómsbøkurnar á føroyskum vóru:
Marjun S. Kjelnæs: *Skriva í sandin*
Rakel Helmsdal: *Hon, sum róði eftir ælaboganum*
Suzanne Collins: *Hungursleikirnir*
Judith Fathalla: *At temja apuna*
Stephenie Meyer: *Skýming*

Mest læntu ungdómsbøkurnar á øðrum málum vóru:
John Green: *The fault in our stars*
Veronica Roth: *Insergent*
Cassandra Clare: *City of ashes*
Sabaa Tahir: *Det ulmende oprør*

Gayle Forman: *Hvis jeg bliver*
Ransom Riggs: *Frøken Peregrines hjem for sælsomme børn*

Mest læntu barnabøkurnar vóru:
Joanne K. Rowling: *Harry Potter*
Francesca Simon: *Herviligi Henry*
Joaquín Cera: *Flunkerne*
Don Rosa: *Don Rosas samlede værker*
Sven Nordqvist: *Pettson og Findus*

## Útlánstilfar

Býarbókasavnið átti við árslok 75.881 bøkur, tíðarrit, ljóðbøkur og dvd-filmar. Tað eru 870 fleiri enn í 2015. Av hesum eru 24.064 eintøk føroyskt tilfar. Harumframt hevði Býarbókasavnið atgongd til túsundtals e-bøkur, ljóðbøkur og filmar gjøgnum eReolen.dk og Filmstriben.dk, sum til ber at taka niður og/ella stroyma á teldu, teldli og fartelefon. Allar føroyskar ljóðbøkur verða keyptar og eitt úrval av donskum.

## Tænastur

Býarbókasavnið hevur samstarv um útlán við hesar stovnar í kommununi: Barnatannrøktina, Boðanesheimið, Eldrasambýlið oman Mattalág, Ellisheimið, Heimið við Vallalíð, Lágargarð, Psykiatriska Depilin, Tjarnargarð og Varðhaldið. Umleið tvær ferðir árliga vitja fólk frá Býarbókasavninum hesar stovnar, undantikið Varðhaldið, har vitjað verður hvønn mánað.

Bókasavnið hevur eina tænastu, ið eitur *Bókaberin*, tað eru starvsfólk, ið koyra út við bókum, ljóðbókum og tíðarritum. Rørslutarnað og onnur, ið ikki fáa komið á bókasavnið, kunnu melda seg til skipanina. Í 2016 var *Bókaberin* úti við bókum hvønn mánað uttan í mai. Les meira um tænastuna á https://www.bbs.fo.

Ókeypis atgongd er til internetið á øllum hæddum á bókasavninum. Eisini er atgongd til teldur, skannara, printarar, kopimaskinu, fax, innbinding við plastspiralryggi og lamineringsmaskinu.

Býarbókasavnið hevur sum einasta bókasavn í landinum sjálvgreiðslu og sjálvheintingarskipan, sum ger, at lánarar kunnu avgreiða síni lán sjálvir.

Frá ársbyrjan í 2015 víðkaði Býarbókasavnið munandi um upplatingartíðirnar, soleiðis at tað eisini bleiv opið um kvøldið og báðar dagarnar í vikuskiftinum. Hetta hevur havt við sær ein støðugan vøkstur í talinum av vitjandi á Býarbókasavninum.

## Upplatingartíðirnar

Upplatingartíðirnar hjá Býarbókasavninum og Tórs Kafé eru hesar:

Mánadag-hósdag kl. 9-21
Fríggjadag kl. 9-18
Leygardag kl. 10-16
Sunnudag kl. 14-17.

## Nýtt í 2016

Í mars varð farið undir nýtt integratiónsátak, nevnt Sambinding, á enskum *Intertwining*. Sambinding er eitt stað, har tilflytarar og ”innføddir” føroyingar hugna sær saman, koma at kennast og læra av hvørjum øðrum. Sambinding í Havn er skipað sum eitt samstarv millum Býarbókasavnið í Havn, Reyða Kross og "Hvussu kunnu vit hjálpa?"

Frá september til desember kundu fólk ein mikudag um mánaðin fáa **rættarhjálp** frá Rættarhjálp Føroya á 4. hædd á Býarbókasavninum.

Frá januar til mai bjóðaði Býarbókasavnið **lektiuhjálp** hvønn mikudag. Tilboðið var serliga ætlað ungum í framhaldsdeild og miðnámi.

Saman við Umhvørvisdeildini hjá Tórshavnar kommunu, skipaði Býarbókasavnið frá juni til august fyri útláni av **el-súkklum**.

Kaféin á Býarbókasavninum fekk frá ársbyrjan 2017 nýggjar eigarar, Birgit Andreasen og Guðri í Bartalsstovu, og í apríl broytti kaféin navn til **Tórs Kafé**.

## Nettænastur

Býarbókasavnið hevur heimasíðu, www.bbs.fo, umframt síður á Facebook og á Instagram, instagram.com/byarbokasavnid, har meira kann lesast um virksemið hjá Býarbókasavninum.

Á heimasíðuni ber til at leita í bókaskránni hjá Býarbókasavninum, bíleggja tilfar, gera bókalistar og at endurnýggja lán. Har finnast eisini tíðindi frá bókasavninum, kalendari við komandi tiltøkum, leinki til e-

bøkur og annað nettilfar, sum Býarbókasavnið bjóðar lánarum sínum, og vegleiðingar um, hvussu ein brúkar tær.

Á facebooksíðuni hjá Býarbókasavninum verður kunnað um tiltøk, bæði komandi og farin, og nógvar myndir eru at finna á bæði facebooksíðuni og á instagramsíðuni hjá Býarbókasavninum.

Til ber eisini at samskifta við bókasavnið umvegis boðtænastur á bæði heimasíðuni og á facebooksíðuni.

Heimasíðan hevði í 2016 umleið 113.000 vitjanir, bæði úr Føroyum og uttan úr heimi. Tað er nakað minni enn í 2015. Talið á facebookfjepparum vaks við umleið 200 og lá við árslok beint oman fyri 1400. Býarbókasavnið hevði við árslok 142 fylgjarar á Instagram.

## Hini bókasøvnini í kommununi

### Kollafjarðar bygdar- og skúlabókasavn

Telefon (skúlin) 302550. Bygdar- og skúlabókasavnið er í skúlanum. Opið er fyri børn og vaksin í vetrarhálvuni (1.oktober til 31.mars) mikukvøld kl. 19-21 og í summarhálvuni (1.apríl til 30.september) mikukvøld kl. 19-20. Stongt er í summarfrítíðini hjá skúlanum.

### Skúlabókasøvnini í Tórshavnar kommunu

Útlánið hjá øllum skúlabókasøvnunum var 57.037 bøkur tilsamans. Í 2015 var hetta talið 58.608. Lán til skúlaflokkar, verkætlanararbeiði og evnisvikur eru ikki íroknað. Alt tilfarið, sum er á skúlabókasøvnunum, verður nógv brúkt til hesi endamál.

Skúlabókasøvnini áttu við árslok tilsamans 200.439 bøkur.

## Lyklatøl 2010-16

| Lyklatøl 2010-16 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 | 15 | 16 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Býarbókasavnið** | | | | | | | |
| **Vitjandi (tús.)** | 82 | 85 | 103 | 115 | 119 | 138 | 144 |
| **Skrásettir lánarar (tús.)** | 11 | 11 | 11 | 11 | 10 | 11 | 10 |
| **Útlán (tús.)** | 100 | 96 | 102 | 90 | 79 | 79 | 71 |
| **Útlánstilfar - eintøk (tús.)** | 73 | 71 | 73 | 74 | 76 | 75 | 76 |
| **Rakstur (mió.)** | 6,4 | 6,1 | 5,8 | 6,2 | 6,6 | 6,5 | 6,6 |
| **Rakstrartuðul frá landinum (mió.)** | 1,5 | 1,5 | 1,4 | 1,3 | 1,3 | 1,3 | 1,3 |
| **Lønarútreiðslur (mió.)** | 4,6 | 4,8 | 4,4 | 4,6 | 4,7 | 5,0 | 5,1 |
| **Útlánstilfar – keyp (mió.)** Írokn. skúlar | 1,9 | 2,1 | 2,1 | 2,0 | 2,1 | 2,0 | 1,8 |
| **Inntøkur (mió.)** Ikki írokn. stuðulin frá landinum | 0,2 | 0,2 | 0,2 | 0,2 | 0,2 | 0,3 | 0,3 |
| **Fulltíðarstørv** | 11,5 | 11,5 | 10,5 | 11,5 | 11,5 | 11,5 | 11,5 |
| **Bókavørðir** | 6,5 | 6,5 | 5,5 | 6,5 | 7,5 | 7,5 | 7,5 |
| **Skrivstovufólk** | 5 | 5 | 5 | 5 | 4 | 4 | 4 |
| **Skúlabókasøvnini** | | | | | | | |
| **Útlán (tús.)** | 50 | 44 | 53 | 56 | 57 | 59 | 57 |
| **Tilfar (tús.)** | 132 | 141 | 151 | 169 | 192 | 197 | 200 |

## Tiltøk á Býarbókasavninum í 2016

Á Facebook liggja nærri lýsingar av tiltøkunum og nógvar myndir.

**Bókmentatiltøk**

19. mars: **Hvannpoppkorn og Summardáafruktsalat**. Joan og Disa greiddu frá. Eisini fekst smakkiroynd.

11. mai: **Summarbókakafé.** Bókavørðir á Býarbókasavninum góvu lesiprei til heilt røttu bøkurnar til summarferiuna.

29. juli: **Licentia Poetica.** Yrkingaupplestur ymsastaðni í býnum á Ólavsøku: Føroya Fólkaháskúli, Steinprent, Bojsensgarður og Býarbókasavnið.

19. november: **Norðurlendsk bókasavnsvika. Sólarris** fyri børn í barnagarðsaldri. Birita Weihe las søguna "Summarið hjá Gudmundi" eftir Stian Hole.

**Lesiringakvøld**

6-7 ferðir um árið møtast 4-5 lesiringar á Býarbókasavninum at práta um bøkur, tey hava lisið. Í 2016 møttust lesiringarnir hesar dagar: 25. januar, 29. februar, 4. apríl, 26. september, 31. oktober, 28. november.

**Skapandi tiltøk**

6. februar-8. februar: **Føstulávintsklipp** á barnabókasavninum.

19. mars-23. apríl: **Páskahugni** hvønn dag á barnabókasavninum.

7. mai-13. mai: **Umhvørvisvikan 2016.** Teknikapping á barnabókasavninum allar dagarnar. Evnið var: Minka um títt $CO^2$-útlát.

27. mai: **Walking Workshop**. Ein øðrvísi gonguferð í Havn, sum endaði við einari skrivivenjing. Samstarv í

sambandi við Nordic Performing Arts Days.
3.oktober-8. oktober: **Diversity 2016**. Teknikapping á barnabókasavninum. Evnið var: ymiskleiki.
26. november. **Jólaklipp** á barnabókasavninum hvønn dag fram til jóla.

**Sambinding** Integratiónstiltak í samstarvi við **Reyða Kross** og **"Hvussu kunnu vit hjálpa?".** Sambindingartiltøkini vóru hesar dagar: 16. februar, 1. mars, 15. mars, 29. mars, 12. apríl, 26. apríl, 10. mai, 13. september, 27. september, 11. oktober, 25. oktober, 8. november, 22. november, 6. desember.

**Listaframsýningar** Tríggjar framsýningar vóru á niðastu hædd í 2016.
Januar: **Sigurjón Petursson**, fotoframsýningin **"Atvent á Fjøllum"**. Fotografurin hevur fingið íblástur úr bókini *Atvent* eftir íslendska rithøvundan Gunnar Gunnarsson.
26. mai-31. august: "**Tórshavn frá 1000 til 1999".** Stór framsýning við kortum, tekningum og myndum.
Aðrar tíðir: **"Havnarprent"**, ið eru grafisk prent, sum øll á onkran hátt hava samband við Havnina. Prentini eru øll framleidd í Steinprenti í Havn av ymsum listafólkum.

**Bókaframsýning** Í útláninum er eitt serligt pláss til framsýning av bókum um ávís evni. Framsýningin verður skift umleið eina ferð um mánaðin.

| | |
|---|---|
| Onnur tiltøk | 14. apríl: **Javnakafé** við Foreldrastuðulsbólkinum hjá Javna.<br>18. juni: **World Wide Knit in Public Day – Tórshavn.**<br>27. juni-21. august: **Lestrarhøli í summarfrítíðini.** Eitt tilboð til teirra, ið hava tørv á einum friðarligum staði at lesa og arbeiða.<br>7. september: **Hvør er Wenders?** Fyrilestur í samband við Filmsdagarnar. Pætur M. Dahl, Birgir Kruse og Súsanna Sørensen.<br>21. september: **Pokémon GO**-tiltak.<br>22. september: **Skateboard, ella rullifjøl ella … Málvariatión**. Fyrilestur í sambandi við **Vísindavøku á ferð.** Jógvan í Lon Jacobsen.<br>29. september: **Talgild fornfrøði**. Fyrilestur í sambandi við **Vísindavøku á ferð.** Helgi D. Michelsen.<br>10. oktober: **Hvat er sálarlig fyrstuhjálp?** Fyrilestur í sambandi við altjóða psykiatridagin. Tórunn Højgaard Ósá og Birgit Andersen.<br>6. desember-16. desember: **Skriva fyri lívi.** Amnesty International Føroya deild skipaði fyri.<br>15. desember-15. Januar: **Lestrarhøli í jólafrítíðini.** Eitt tilboð til teirra, ið hava tørv á einum friðarligum staði at lesa og arbeiða. |

## Størv og førleikamenning

Á Býarbókasavninum eru hesi størv ásett:

Býarbókavørðurin er leiðari.
1. bókavørðurin er varaleiðari.
Bókavørðir: 5½ fulltíðarstørv eru ásett, og 6 bókavørðir arbeiða í hesum størvum.

Skrivstovufólk: 4 fulltíðarstørv eru ásett, og 6 skrivstovufólk arbeiða í hesum størvum.
Haraftrat eru seks bókauppsetarar (lesandi á miðnámi), eitt hjálparfólk og eitt fólk í arbeiðsroynd.

## Broytingar í starvsviðurskiftum í 2016

Ein **bókauppsetari** er givin og ein nýggjur settur í árinum.
Frá 16. mars-31. august var **býarbókavørðurin** í skrivifarloyvi í sambandi við, at hann fekk seks mánaðar starvsløn frá Mentanargrunni Landsins.
14.-25. november: Næmingur úr **Skúlanum á Fløtum** í starvsvenjing.

## Menning og førleikamenning

6. oktober: **Verkstova um skúlabókasøvn** í Tórshavnar kommunu. Mentamáladeildin í Tórshavnar kommunu skipaði fyri.
28.-29. oktober: **Starvsfólkadagar** á Gjáargarði.
31. oktober-5. november: Býarbókavørðurin á **fundum í Keypmannahavn við veitarar av KT-skipanum til bókasøvn**. Eisini **vitjanir á bókasøvnum** í Keypmannahavn.
10. november: **Intersign** - undirvísing í kunningar-skermum. Tvey fólk frá Býarbókasavninum luttóku.
10.-13. november: Barnabókavørðirnir **vitjaðu bókasøvn** í Keypmannahavn og luttóku á **Bogforum 2016**

## Annað virksemi

| | |
|---|---|
| Merkisdagar | 20. oktober: **Mentanarvirðislønir M.A. Jacobsens** og **Barnamentanarheiðurslønir Tórshavnar býráðs** 2016 vórðu handaðar í Reinsarínum.<br>8. desember: **Fýra rundir starvsdagar hildnir á Býarbókasavninum.** Ein bókavørður hevði 25 ára starvsdag, ein hevði 30 ára starvsdag, og ein hevði 35 ára starvsdag. Eitt skrivstovufólk hevði 30 ára starvsdag. Borgarstjórin handaði gávur og blómur. |
| Samstarv | **Projekt Nord.** Norðurlendskt e-bókasamstarv millum bókasøvn í Føroyum, Íslandi og Danmark.<br>13. apríl: Vitjan frá **Fjell Bibliotek** í Fjell kommune í Noreg. **Institut for Fremtidsforskning v/ Bogi Eliasen** skipaði fyri vitjanini.<br>24. juni: **Bókasavnsleiðarafundur** varð hildin á Býarbókasavninum. |

Broytingar í hølisviðurskiftum í 2016

Arbeitt hevur verið við at innrætta part av kjallaranum til opna bókagoymslu, sum almenningurin fær atgongd til í 2017.

Arbeitt hevur verið við at gera eina byggiskrá fyri dagføring av øllum bygninginum, sum Býarbókasavnið húsast í.

Býarbókasavnið

Niels Finsens gøtu 7 • 100 Tórshavn • Tel 302030

## Opið hvønn dag:

Mánadag-hósdag kl. 9-21

Fríggjadag kl. 9-18

Leygardag kl. 10-16

Sunnudag kl. 14-17